## Juninho venur við Víkingi

18 ára gamal brasiliumaður royndarvenur í hesum døgum við Víkingi. Juninho, sum ungi maðurin eitur, sigst vera ein kvikur og tekniskt góður spælari, ið kann nýtast á framrættaða miðvøllinum. Hann er komin til Føroya saman við Alex, sum nú royndarvenur við KÍ, og er tað Ólavur Waag Høgnesen, sum hevur fingið venjingarnar í lag.



## Eitt felag afturat í FC Amager

Á heimasíðu sínari boðar Kløvermarken frá, at endaliga avgerðin varð tikin á eykaaðalfundi hjá felagnum. - Vit eru sera fegin og errin um, at Kløvermarken FB er við í FC Amager. Talan er um eitt stórt og siðbundið felag á Amager, og vit eru tí vís í, at eisini Kløvermarken kann geva nógv til projektið kring FC Amager, sigur Todin Jónsson, nevndarformaður og virkandi stjóri í Fremad Amager. FC Amager verður veruleiki tann 1. juli í ár. Higar til eru Fremad Amager, Kastrup og Kløvermarken við í samanleggingini.

# eypið



*Í álopspartinum hevði Kyndil ikki neyðuga tolið fyrst løtuna. Tá riggaði verjuspælið annars hampuliga væl, men tá mál ikki verða skotin, gerst tað tungt*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Joan Midjord Djordjevic var aftur at síggja hjá Stjørnuni. Partvíst á óvanda plássinum sum avloysari fyri Unu á strikuni, men eisin á meira vanda plássinum sum spælskipari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hava spælt betri



*Tær eru øgiliga sterkar, og tí verður tað trupult hjá okkum at koma ígjøgnum verjuna, helt Tordis Tróndarson eftir kvinnufinaluna*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Tordis Tróndarson hevði vónað, at hon og Kyndil skuldu bíta meira frá sær móti Stjørnuni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tey flestu høvdu roknað við, at Stjørnan skuldi vinna ein hampuliga tryggan sigur á Stjørnuni. Men hóast hetta eisini gjørdist úrslitið, so helt Tordis Tróndarson, at Kyndil kundi víst meira, enn tær gjørdu leygardagin.

- Eg haldi ikki, at vit spældu upp til okkara besta í dag. Tað eru fleiri dystir, har vit hava sýnt betri spæl, enn vit gjørdu í dag.

- Men sjey mál. Tað er so tað besta úrslitið, sum vit hava klárað móti Stjørnuni higartil í ár. So eg veit ikki rættiliga. Vit høvdu so vónað, at vit kundu geva Stjørnuni ein skarpan gang. Men tað gjørdu vit so ikki í dag.

Tað sá út til, at tit høvdu gott á teimum í verjuni. Men í álopinum gekk spælið ikki heilt so væl hjá tykkum. Vóru tað nervar, sum gjørdu um seg?

- Nei. Tær eru øgiliga sterkar fysiskt, og tær kláraðu væl at halda okkum. Og tá er tað altso sera trupult at spæla seg ígjøgnum verjuna, helt Tordis.

# Fingu eina uppliving

**Hóast tapið, so vóru venjararnir hjá Kyndli væl nøgdir um avrikið hjá sínum spælarum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tordis Tróndarson helt, at tær ikki spældu upp til sítt besta leygardagin. Og sum so var Uni Wardum, ikki heilt ósamdur í hesum.

- Eg haldi at okkara spælarar eru somikið óroyndar, at tað sigur seg sjálvt, at tær hava nervar til ein slíkan dyst. Men sum eg havi sagt fyrr, so skal hetta bara vera við til at koyra enn meira á spælararnar víðari fram.

- Og tað er væl so, at Stjørnan var betur í dag. Vit ætlaðu at geva teimum ein skarpan gang. Og partvíst gjørdu vit eisini tað. Men tær vóru bara for góðar í dag.

Var tað nakað, ið tit sum venjarar kundu gjørt øðrvísi í dystinum?

- Tað tosaðu vit um eftir dystin. Men tað haldi eg ikki. Vit vildu tryggja okkum, at tær ikki fingu skjótálopini at koyra, og tað riggaði væl. Men so hava tær nakrar bakkar, sum bara kunnu slynga handan bóltin inn. Og tað er altso trupult at verja fyri. Vit standa eisini væl í verjuni ein stóran part av dystinum. Men tá tær so fáa nøkur kanska nemm mál av veinginum, so fer liðið eitt sindur niður.

Og tá tað so verða hasi fýrafimm málini á muni. So vita tit kanska, at dysturin er farin?

- Bæði og. Tá tú hevur spælt teg í finaluna, so skalt tú alla tíðina trúgva upp á møguleikan. Tú hevur jú fyrr sæð, at lið hava vent dystum. Men jú. Tá tað eru hasi málini á muni, og Stjørnan liggur omaná, so er tað ikki nemt.

- Men hetta er eingin fiasko. Vit fóru inn til dystin, og vit skuldu njóta hetta sum eina uppliving. Tað gjørdu vit eisini, og eg haldi, at spælararnir hjá okkum góvu alt tað, sum tær áttu. Og hatta var tað, sum vit megnaðu í núverandi støðuni, sigur Uni Wardum, sum saman við eldra beiggjanum, Hannis, er venjari hjá Kyndilskvinnunum í vetur.

## FAKTA

**Stjørnan-Kyndil 29-22 (15-9)**

**10 min:** 4-2
**20 min:** 11-8
**40 min:** 19-13
**50 min:** 26-16
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 12(4), Durita Christoffersen 6, Bára Skaale Klakstein 4, Joan Midjord Djordjevic 3, Hanna Mikkelsen 2, Durita Ljósstein 1, Anna Kristina Samson 1
**Kyndil:** Jacklin Durhuus 8(1), Randi S. Wardum 4, Lina Andriulyte 3, Súsanna Petersen 2, Tordis Tróndarson 2, Barbara Egilstrøð 2, Mia Káradóttir 1
**Brotskøst:** Stjørnan 5, Kyndil 2
**Útvísingar:** Stjørnan 1, Kyndil 3
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen